fara at hoyra einari farnari tíð til. Seinasta stigið í Teirri Tigandi Kollveltingini er endin á politikkinum, eitt skrædl sum endar í umferðum av mótmælum, kúgan og vónloysi.

## Nøkur uppskot um, hvat kann gerast

*“Men kann politikkurin verða skaptur av nýggjum, so at vit sleppa undan hesi vanlukku gongd? Finst ein nýggj dagsskrá, sum vit kunna fevna, so at fólkastýrið verður bygt uppaftur? Ber tað til at fáa fatur á trupulleikum sum sosialum órættvísi, ójavna og skeivum maktbýti, so at politikkur aftur gerst ein vøra, fólk vilja keypa? Kann globaliseringin myndast soleiðis, at hon kemur øllum til góðar og ikki bara nøkrum fáum?“* spyr Noreena Hertz og heldur fram:

*“Eg haldi, tað ber til, at ein nýggj dagsskrá er møgulig, at endurstovna sambandið millum tað sosiala og tað búskaparliga og at taka fasta avgerð um, at øll hava rætt til rættvísi uttan mun til, hvar tey eru stødd. Orsøkin til, at hetta ikki er gjørt, er ikki bara tað, at seráhugamál verða vard ella at tilfeingi vantar, men tí at moralsk imperativ, ábyrgd og politiskur vilji vanta.*”

Endamálið við bókini hjá Noreenu Hertz er ikki at skapa eina nýggja búskaparliga ideologi. Fremsta endamálið er at vísa á ta skeivu gongdina í heiminum: at tann óavmarkaða kapitalisman, sum hevur frítt at fara um allan heim við globaliseringini, fær so stórt vald, at fólkaræðini virka ikki longur. At stjórnirnar og parlamentini eru undir eftirliti hjá stórfyritøkunum í staðin fyri, at myndugleikarnir hava eftirlit við teimum. At munurin millum rík og fátæk lond og rík og fátæk fólk í londunum veksur alsamt. At politikararnir røkja ikki longur áhugamálini hjá fólkinum, men áhugamálini hjá kapitalinum. At politikkur er vorðin búskapur. Og at búskaparvøkstur merkir ikki, at øll, men bara tey fáu fáa tað betur.

Kortini endar hon sína bók við nøkrum tonkum um, hvat kann gerast. Og eg fari eisini at enda hesa sendirøð við at endurgeva tað, hon mælir til.

Í fyrsta lagi krevur henda nýggja dagsskráin, at tær stóru fyritøkurnar missa síni rættindi innan fyri landamørk. At fyritøkur veita politiskum flokkum stuðul til valstríð er at halda demokratiið fyri spott og ber eina skipan víðari fram, sum røkir áhugamálini hjá teimum fáu – tað rekur út heldur enn inn. Í praksis merkir hetta, at tað kvørkratak, sum fyritøkurnar hava á politikkinum, má loysast, og at tey lond, sum ikki longu hava gjørt hetta, muga fremja nýskipanir soleiðis, at tað almenna fíggjar valstríðini. Allur privatur stuðul til valstríð hevur bindingar við sær. Skula fólk aftur fáa álit á politikarunum, muga teir prógva fyri veljarunum, at teir arbeiða fyri almenningin, ikki fyri tey fáu.

Í øðrum lagi muga politikararnir gevast við at halda, at tá tað regnar á prestin, so dryppar á deknin. Arvurin frá Reagan og Thatcher hevur rættvísgjørt alt frá vælferðarveitingum til fyritøkur til skattalætta hjá teimum ríku. Tað er eyðsýnt, at krystallklár fakta andøva ímóti hesi teori. Ójavnin økist, meðan fyritøkurnar leggja vinningin inn undir seg, tá tær fáa skattalætta ella studning og hugsa ikki um lokalsamfelagið. Í praksis merkir afturvísingin av hesum sjálvsagda sannleika ikki einans, at neyðugt er at halda uppat við at veita fyritøkum vælferðartænastur, men neyðugt verður at gjøgnumhugsa alla skipanina við javning gjøgnum skattarokningina og almennu útreiðslurnar. Ein heimur við vardum íbúðarøkjum við síðuna av ghettoum er ikki einans samvitskuleysur, hann er hættisligur. Politikararnir muga gevast við stórorðaðum lyftum og við at látast sum um, at alt man fara at laga seg sum frálíður. Skal alt laga seg til tað besta, krevjast hørð val og raðfestingar.

Í triðja lagi mugu teir einstøku londini hava eftirlit við fyritøkunum. Neyðugt verður at gera reglur í staðin fyri at taka reglur av, og í summum førum eigur at verða umhugsað, um ikki staturin skal yvirtaka raksturin av kollektivum hentleikum. Stovnar, sum stríðast ímóti monopoltendensunum, muga styrkjast og fáa størri játtanir. Møguleikin at eiga fleiri fjølmiðlar eigur at verða avmarkaður. Tað eigur at vera skylda hjá fyritøkunum at greiða frá sosialum og umhvørvisligum viðurskiftum.

Tað er ikki nóg mikið at byggja politikkin uppaftur innan fyri landamørk. Í einum heimi, har kapitalurin er globalur, má politikkurin verða bygdur uppaftur globalt eisini.

Fyrst muga vit fáa mekanismur, sum hjálpa fólki at stríðast móti órættvísi. Øll fólk, hvar tey enn eru stødd, muga fáa tey rættindini, sum vit í tí ríka partinum av heiminum halda vera eina sjálvfylgju. Øllum arbeiðsmonnum og –kvinnum muga tryggjast tey somu grundleggjandi rættindini til eitt minstamark fyri standardum fyri heilsu, trygd og vælferð á arbeiðsplássinum, og tey skula ikki kunna sigast upp uttan rímiliga grundgeving. Fleirtjóða fyritøkur skula ikki hava møguleika at skúgva hesi rættindi til viks uttan mun til, hvar tær hava sítt virksemi.

Misnøgdin heldur fram at bólgna í einum heimi, har fólk ikki hava rættindi. Tí er tað avgerandi, at tær fyritøkur, sum fremja ágang, verða drignar til svars, hvar tær so eru. Og at offrini fáa endurgjald.

Stjórninar í teimum ríku londunum muga broyta lógarverkið soleiðis, at tær stóru fyritøkurnar standa til svars fyri sínum dótturfeløgum, hvørjum landi hesi so virka í. Haraftrat muga allir arbeiðarar hava atgongd til ein globalan grunn fyri rættarhjálp.

Tínæst verður neyðugt at stovna ein heimsumfatandi sosialan stovn. Hesin stovnur skal viga upp ímóti heimshandilsfelagsskapinum WTO og skal verja mannarættindini, arbeiðsstandardir og umhvørvið. Stovnurin má hava líka hvassar tenn sum WTO og líka effektiv amboð at fremja sínar ætlanir. Saman við WTO má stovnurin verða undirlagdur ein semingsstovn, sum kann sóna handil við onnur áhugamál, tá stovnarnir bresta saman – og tað fara teir ivaleyst at gera.

Vit í teimum ríku londunum á norðaru hálvu muga hjálpa menningarlondunum at bera kostnaðin av hægri globalum standardum.

At enda muga vit hjálpa teimum, sum eru taparar í globaliseringini. Í minsta lagi muga vit strika skuldina og venda kapitalstreyminum, sum rekur norður. Hjálpin, sum er fallin 45% til tey mest tilafturskomnu londini síðani 1990, má økjast munandi. Allar forðingar fyri landbúnaðar- og klæðnavørum úr menningarlondunum muga beinast burtur. Órættvísar handilsreglur gera, at tey missa útivið tvær miljardir dollarar hvønn dag.

Umframt alt hetta tørvar okkum nýggjan pening fyri at kunna fremja hesi mál. Heiminum tørvar ein globalan skattamyndugleika, møguliga knýttur at ST. Myndugleikin má hava vald at krevja inn óbeinleiðis skatt, td á dálking og orkunýtslu, sum so aftur kann brúkast til umhvørvisvernd. Hesin myndugleikin skal eisini hava rætt til at krevja inn beinleiðis skatt frá fleirtjóða fyritøkum. Heilsuavgjøld á tubbaki og alkoholi eiga at verða brúkt til at fíggja ein globalan heilsugrunn.

Hesi seks stigini eru bara byrjanin til eina virkisætlan um at stoypa globaliseringina av nýggjum. Tey umboða ein møguleika at sóna tann globala búskapin við sosialt rættvísi, eitt stað at byrja, tá vit nærkast teimum grundleggjandi spurningunum, sum Tann Tigandi Kollveltingin elvir til.

Noreena Hertz endar sína bók við hesum orðum:

*“Ein betri heimur er møguligur: ein heimur við størri javna, rættvísi og einum veruligum demokratii. Men her er ein ávaring: Fara tey, sum hava valdið, ikki í holt við hesar spurningar, so fara tey, sum Tann Tigandi Kollveltingin hevur gjørt rættindaleys, ella tey, sum tala teirra vegna, at halda fram, til tey hava hamrað seg ígjøgnum valdsins dyr við øllum ráðum, sum hugsast kunna. Skal heimur okkara framvegis vera merktur av dagsins skeiva valdsbýti, og fer ójavnin at halda fram at økjast, sum hann hevur gjørt 20 tey seinastu árini, so koma mótmæli í staðin fyri politikk. Tá verða mótmæli og øði stovnsfest, meðan demokratiið doyr, eisini í teimum statunum sum eru stoltir av at vera demokratiskir. Fólkið tekur ikki statin til sín aftur, fyrr enn staturin tekur fólkið til sín aftur. So leingi fyrimunirnir við globaliseringini ikki gagna fleiri, fara fólk at halda fram at gera uppreistur móti globaliseringini.*”

*Noreena Hertz: The Silent Takeover*

*Á norskum: Den tause revolusjonen*

*Fyri fáum døgum síðani kom bókin á donskum og kallast: Den tavse magtovertagelse*



*Alistair Campbell var kanska meira enn nakar maðurin, sum fekk Tony Blair á ovastu rók í bretskum politikki*